## DAGSINS MEINING

# ACD framvegis ryggásin

Alt Føroya fólk bíðar í spenningi. Eingin veit, hvør verður komandi løgmaður ella hvør fer at skipa nýtt landsstýri. Fyribils liggur henda avgerð í hondunum á verandi løgmanni, Anfinni Kallsberg.

Í gjár hevði hann so fund við sítt bakland fyri at lodda dýpið. Tað er neyvan nakað dulsmál, at stór ósemja er innanhýsis í Fólkaflokkinum, hvønn veg flokkurin skal velja at fara komandi fýra árini: at halda fram við verandi samgongu og fáa Javnaðarflokkin við ella at skipa eina samgongu saman við teimum báðum stóru andstøðuflokkunum.

Fullveldisvongurin við eitt nú fyrrverandi borgarstjóranum í Havn á odda ynskir Sambandið, har piparið grør, meðan meira hóvligi vongurin við Bjarna Djurholm, Óla Breckmann og Jørgen Niclassen ynskir hinvegin Tjóðveldið, har piparið grør og sær heldur eitt samstarv í fýra ár saman við Sambandinum og Javnaðarflokkinum. Henda tvístøða ger sjálvandi uppgávuna hjá løgmanni uppaftur trupulari. Hann dugir helst at síggja fyrimunir og vansar við báðum hesum møguleikum. Við blaðið í dag ger hann líkasum støðuna upp. Hann vil fyrst royna ACDE aftur og eftir tað ABCD. Fyrri møguleikin krevur so, at C og E royna at semjast, meðan tann seinna krevur, at B veruliga vísir ein vilja til at vera við í yvirtøkum.

Soleiðis liggur landið. Vónandi fær løgmaður greitt upp fyri hesi fløkju ella má hann geva ørðum initiativið. Tað er skilagott av løgmanni ikki at leypa um garðin, har hann er lægstur, nevniliga at fara inn í eina samgongu saman við EH-alliansuni. Hon er alt ov smøl sum løgmaður so beint hevur nevnt fleiri ferðir. Og sama heldur leiðslan í Sjálvstýrisflokkinum, ið eisini er ein skilagóð støða.

Felagsnevnarin fyri eini breiðari samgongu tykist tí vera ACD. Tað var eisini júst tað vit skrivaðu á hesum stað dagin eftir valið. Nú má so valið fella á antin B ella E. Komandi dagarnir fara helst at geva svarið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvat er ein meiriluti?

**Helgi Abrahamsen**



Í 1998 fingu vit føroyingar at vita frá samgonguflokkunum, at Føroyar skuldu skipast sum fullveldisríki, og at fólkið skuldi sleppa at atkvøða um henda spurning á eini fólkaatkvøðu. Um 50,1 prosent av veljarunum atkvøddu "ja", so var leyst og liðugt. - Vit kundu jú ikki lata minnilutan ráða, segði Høgni Hoydal.

Fólkaatkvøðan kom tó ongantíð, tí ein partur av samgonguflokkunum óttaðist fyri, at veljarin fór at siga "nei". - So var betur at køva meirilutan, og lata ein tigandi minniluta ráða.

**Løgtingsval sum fólkaatkvøða**

Áðrenn løgtingsvalið tann 30. apríl í ár, segði Høgni Hoydal, at valið var at meta sum ein fólkaatkvøða um fullveldi. Men hetta skuldi hann ongantíð havt sagt, tí Sambandsflokkurin gjørdist størsti flokkur á valinum, og andstøðuflokkarnir fingu samanlagt 51,1 prosent av atkvøðunum.

**Tulka valúrslitið sum best ber til**

Men nú hava ymiskir loysingarmenn sett eina skipaða blaðskriving í gongd, har valúrslitið verður tulkað. Allar atkvøður fyri samgonguflokkunum verða roknaðar sum atkvøður fyri loysing, og harumframt verður mint á, at Miðflokkurin lutvíst hevur stuðlað fullveldistilgongdini. Tí skulu tær atkvøðurnar eisini teljast við.

- Einki verður sagt um, at Sjálvstýrisflokkurin áðrenn valið segði, at tíðin var enn ikki búgvin til fullveldi.

- Einki verður heldur sagt um, at Fólkaflokkurin áðrenn valið segði, at ferðin á sjálvstýrisleið hevði verið í so nógv, og at tí mátti slakkast av nú.

Nei fullveldisvongurin roknar allar atkvøðurnar sum sínar, og kemur til ta niðurstøðu, at hann hevur vunnið stórsigur á valinum. Og hesin "sigurin" skal brúkast, til at trýsta løgmann til at skipa eina nýggja fullveldissamgongu.

Hóskandi er tí at spyrja, um hatta við meirilutanum bara skuldi vera galdandi annan vegin?

# Lat skynsemi ráða

**Rani Wardum**

Tað gleðir meg ótrúliga nógv, sum samfelags- og skattaborgara her á landi, at Fólkaflokkurin hevur útihýst at skipa samgongu við Tjóðveldisflokkinum.

Tjóðveldisflokkurin hevur nú í 4 ár misrøkt sínar skyldur mótvegis tí fólki, sum búleikast her á klettunum, við bara at hugsa um fullveldisætlanina og gloyma, at teir hava aðrar skyldur mótvegis hesum samfelag og fólki.

Høgni Hoydal, sum skattaborgari finni eg meg ikki í, at tú spælir russiskt roulette við mínari familju, sum tú hevur gjørt hesi seinastu 4 árini. Allar tínar ætlanir um yvirtøkur hevur hvørki høvd ella hali verið á. Snøkt sagt hevur onki skil verið á tínum arbeiðssetningi, har tú í nógvum førum er farin rættiliga lætt um sannleikan.

Eg kann taka eitt dømi sum tildømis yvirtøku av løgregluni og rættarskipanini, har tú hevur sagt, at henda yvirtøka kostar ca. 40 mill. kr. Bara lønir til politistar, fúta, ákærar og kontórfólk liggur nokk væl omanfyri 40 mill. kr. Harnæst skulu eisini roknast pensiónir. Innan dómsvaldið skulu setast kontórfólk. Her skal starvsfólkatalið eisini økjast. Útyvir hetta skal eisini upprættast eitt Løgmálaráðharrastýri við løgmálaráðharra, juristum kontórfólki – kanska eitt stað millum 50 og 100 fólk. So alt í alt hevði henda yvirtøka nokk kostað væl omanfyri 100 mill. kr. um árið og sum skal fíggjast okkara fiskimonnum. Í dag er alt hettar fíggjað av danska statinum uttan um blokkin. Harnæst skulu vit eisini finna fígging til bygningar, materiel og viðlíkahald av hesum.

Høgni Hoydal, kenni eg teg rætt, so vil tú rættvísgera hetta við, at henda yvirtøka eisini kann lata seg gera, um alt Føroya fólk stendur saman, so skulu vit nokk finna fígging til hettar eisini. Tú hevur bara gloymt nakað serliga umráðandi. Alt Føroya fólk stendur ikki saman um hesar yvirtøkur. Ca. 75% av Føroya fólki dugir at rokna, har vit vita at 2 + 2 er 4 og hvørki 3 ella 5.

Eitt annað, sum tú ikki hevur hugsa í hesum sambandi er, »hvar fært tú alt starvsfólkið frá til upprættan av eini rættarskipan og løgmálaráði«!!!

Í hesum sambandi vil eg takka Jóannes Eidesgaard fyri, at hann ikki hoppaði á fullveldisvognin hjá Høgna Hoydal og hansara ørvitisprojekti.

Nei, nú er tíðin komin, har tit skulu halda tykkara vallyftir um at rætta upp á okkara samfelag, sum hevur ligið í misrøkt nú í 4 ár.

Tann einasti mátin hettar kann lata seg gera, er at sambands-, javnaðar- og fólkaflokkurin finna saman í eina samgongu. Hvør so verður løgmaður er líka mikið. Tað er í síðsta enda politikkurin sum verður førdur, sum er avgerandi, og ikki persónurin. So føli eg, at mínar skattakrónur eru endaðar á rætta stað.

**Sosialurin**

Sosialurin
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Landsmyndugleikarnir taka nú aftur skúlabørn sum gíslar

**Finnleif Guttesen**
*borgarstjóri*



Loysigjaldið er 650.000 krónur, sum kommunurnar eru kravdar eftir.

Tvøroyrar býráð hevur sum ein sjálvfylgja nokta at gjalda hetta loysigjald fyri savnsrøkt, tí byrjar tú fyrst at gjalda, so kemur sami gíslatakari og krevur uppaftur meira seinri.

Læraralønir er ein samráðingarspurningur millum Fíggjarmálastýrið og lærarafelagið. At blanda kommunurnar uppí nú, er bert ein roynd hjá landsmyndugleikunum, at sleppa sær undan ábyrgd.

At landið hevur gjørt eina vánaliga avtalu við lærarafelagið, skulu kommunurnar ikki revsast fyri.

Málið um savnsrøkt er 25 ára gamalt, og nú landsmyndugleikarnir hava fingið knívin á barkan frá lærarafelagnum, roynir landið at skúgva trupuleikan yvir á kommunurnar, tí tað er kommunurnar og ikki landið, sum koma at merkja sviðan av gíslatøkuni, so sum, eingin røkt av serstovum og amboðum, blokering av fráfarðingarroyndunum og annað.

At kommunur hokna undir hesum trýsti er væl skiljandi, men fyri tað, er tað ikki rætt at brúka borgarans pengar til loysigjald.

Tað kann ikki vera nakar ivi um, at tá ið landsmyndugleikin áleggur lærarum størri byrðar, so er tað sami myndugleiki sum má gjalda.

Sambart lógini um fólkaskúlan, so hava kommunustýrini ábyrgd av, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk til undirvísingina og av rakstrinum av skúlanum. Raksturin av skúlanum fevnir um hiting, viðlíkahald og reingerð.

Alt annað er tengt at undirvísingini og er tí ábyrgd hjá lærarunum. Um sáttmálin millum landið og lærarafelagið frítekur lærarnar fyri at røkja fakhølini, so verður hetta ikki av sær sjálvum ein partur av rakstrinum av skúlanum.

Her er hinvegin talan um, at landsmyndugleikin ger ein sáttmála, sum tað er ógjørligt at undirvísa eftir.

# Standi saman við grønlendsku fólkatingsmonnunum

**Tórbjørn Jacobsen**
*fólkatingsmaður*



Við hesum skal verða sagt frá, at føroyski limurin í Norðuratlantsbólkinum á fólkatingi, Tórbjørn Jacobsen, fult og heilt tekur undir við kravinum hjá grønlendsku fólkatings-limunum, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen um, at sáttmálin millum Danmarkar og USA frá 1951 um nýtslu av Grønlandi til hernaðarlig endamál verður broyttur, soleiðis at Grønland verður fullgyldugur sáttmálapartur.

Norðuratlantsbólkurin er sostatt fullsamdur í hesum máli.

Sáttmálin frá 1951 hevur við sær, at grønlendska fólkið hvørki hevur ávirkan á ella innlit í, hvat teirra land verður nýtt til. Støðan hjá Norðuratlantsbólkinum er, at hetta als ikki kann góðtakast.

# Kjarnan í føroyska fólkinum valdi ikki loysing!

**Jørmund Vágadal**



Tað er beinleiðis ósatt, táð Zackarias Wang og Abraham Mikladal v.fl. áhaldandi royna at siga okkum øðrum, at vit valdu loysingina tann 30 apríl farna. Hetta passar ikki!

Av akademikara og kultiveraða manninum Zacharias Wang hava vit loyvið at krevja meira, enn vit annars krevja av meiniga manninum á gøtuni, og eisini at hann fer reiðiliga og sømiliga um søguligar verunleikar, sum m.a. liggja aftanfyri løgtingsvalið farna. Fjákuta og barnsliga manipoleringin (falsanin) av tølum og úrslitum tæna Zachariasi ikki til heiðurs í so máta.

Abraham Mikladal kenni eg ikki, so av honum kann eg av góðum grundum onki krevja, tá í um søgulig fakta umræður, kanska veit hann ikki betur og er tí fyrigivin.

Nøkur tøl og faktað, sum tala fyri seg sjálvan:

Jenis av Rana fór ikki til val sum tjóðveldismaður ella loysingamaður. Hann fór til val saman við annstøðuni og ikki samgonginі. Jenis hevur sagt og sigur framvegis, at tað eru onnur mál, sum fyri hann hava størri týdning enn hetta práti um loysing og samband og kann hann tí verða í øllum samgongum.

At Jenis nú eftir val vinglar ímillum flokkar tænir Jenisi ikki til nakran heiður sum politikkari og munu menn helst vilja verða hann fyri uttan í eini komandi samgongu.

Uttan at snara veruleikanum og seta kikaran fyri blinda eyga, kunnu vit søguliga slága fast at:

Tjóðveldisfólk við 7.229 atkvøðum ella 23,7% vilja hava loysing.

Sambandsfl. við 7.954 ella 26,0% atkvøðum ikki vilja hava "her og nú" loysing.

Vit kunnu herumframt hava í mentu, uttan at gera nøkrum órætt, at stórur partur av teimunm 6.378 atkvøðunum hjá Javnaðarfl. ikki vilja hava "her og nú" loysing og at partur av teimum 6.362 atkvøðunum hjá Fólkafl. heldur ikki vilja hava "her og nú" loysing.

Sjálvstýrisfl. við sínum 1351 atkvøðum hevur ikki havt siðvenju fyri at vilja "her og nú" loysing.

Eftir stendir at:

Tjóðveldisfl. við 23,7% av atkvøðunum við vissu kann sigast at vilja "her og nú" loysing. Hetta er einasti bólkur í føroyska samfelagnum, sum vil "her og nú" loysing.

Sambandfl. við sínum 26 % vil ikki loysing "her og nú"!

Javnaðarfl. við sínum 6.378 atkvøðum vil ikki hava loysing "her og nú"!

Annfinn Kalsberg brýtir við gamla siðvenju og velur at "brúka" stýrisskipanarlógina sum sleggju fyri at tvinga eina ella aðra samgongu ígjøgnum, sum hann heldur er tann besta. Fyri hvønn? kunnu vit spyrja: tí Fólkafl. liggur 1.602 atkvøður aftanfyri Sambandfl. og 877 atkvøður aftanfyri Tjóðveldisfl. og 26 atkvøður aftanfyri Javnaðarfl. Fólkafl. liggur 7.980 atkvøður aftan fyri Javnaðarfl. og Sambandsfl.

Í minsta lagi 14.332 av teimum 30.556 veljararunum vilja hava eina ABC samgongu! Javnaðarfl. og Sambandsfl. við 14.332 atkvøðum vilja hava eina stóra samgongu við Fólkafl. Hetta er komið so sjónliga til sjóndar, at eg ikki her gerið nøkrum órætt við at siga sum er.

Hvat gevur Annfinni Kalsberg rætt til, við 6.352 atkvøðum, at diktera eina nýggja samgongu? Og hvat fyri samgongu? Hvar er fólkaræði og veljarin?

Eidisgaard hevur ferð eftir ferð so rámandi sagt: "skulu føroyingar og veljarin slettis ikki leggja til merkis, at tað hevur verið val?

Framferðin hjá Annfinnni er ókend og lítið dámlig um okkara leiðir. Er tað nýggja stýriskipanarlógin, sum opnar fyri, at ein maður á fjórða plássi og valdur á løgting fyri 4 árum síðani, kann sita 4 ár afturat sum næsthægsti embætismaður uttan meiriluta, so snikka eina nýggja stýrisskipanarlóg saman sum er í tráð við okkara fólkaræði.

Eg havi havt stóra virðing fyri Annfinni, havi tað ivaleyst enn, men lítið væntar í til at støðan broytist.

**Annfinn ikki so populerur meira sum løgmansevni!**

Kagaði í teldukanning í Dimmu í gjár um popularitetin at verða løgmaður í Føroyum. Annfinn hevur verið suverenur á hesum økið. Nú velja vit ikki løgmann beinleiðis í Føroyum, men áhugavert er tað tó, at fylgja við rákinum kortini.

Her eru sjónligar broytingar hendar tann skeiva vegin fyri Annfinn. Nú liggur løgmaður á 1. plássi við 31%, Jóannis Eidisgaard á 2. plássi við 25%, Lisbeth við 23% og Eyðun Elttør við 21%.

**Stórur brúktbilamarknaður**




**Mazda 323 C 1,5i LX**
bláur, 3 hurðar, 5 gear,
árg. 03/97, km 72.000
**89.000,-**




**Mazda 323 S 1,5i LX**
reyður, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 11/98, km 57.000
**96.000,-**




**Mazda 323 S 1,5i LX**
reyður, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 05/97, km 69.000
**78.000,-**




**Mazda 323 S 1,5i LX**
gráur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 08/97, km 61.000
**82.000,-**




**Mazda 626 S 1,8i LX**
grønur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 05/96, km 151.000
**75.000,-**

BERG MOTORS BERG MOTORS BERG MOTORS BERG MOTORS
sýnaður 02/00

**Ford Escort 1,8 TurboDiesel St.car**
reyður, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 08/97, km 50.000
**110.000,-**




**Ford Escort 1,8 Diesel Sedan**
svartur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 08/95, km 146.000
**76.000,-**



**Seat Cordoba**
gráur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 07/96, km 82.000
**75.000,-**




**Renault Megane 1,6e**
reyður, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 12/96, km 70.000
**80.000,-**




**Toyota Corolla Sedan 1,3 Galla**
grønur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 07/95, km 69.000
**79.000,-**

**VØRUVOGNAR**



**Toyota Hi-Lux Pickup Diesel**
bláur, 2 hurðar, 5 gear,
árg. 12/94, km 122.000
**90.000,-**

BERG MOTORS BERG MOTORS BERG MOTORS BERG MOTORS

**Mazda E2200 PickUp trælast**
reyður, 2 hurðar, 5 gear,
árg. 05/97, km 79.000
**74.000,-**



**Mazda E2200 PanelVan**
gráur, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 01/98, km 74.000
**74.000,-**



**Mazda E2200 PanelVan Diesel**
hvítur, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 1997, km 100.000
**88.000,-**

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35